Magnus Rasmussen
Erhard Joensen
Beinir Johannesen
Árni Skaale
Steffan Klein Poulsen
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 39/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju (Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av brennioljugjaldinum)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, nr. 2 verður orðað soleiðis:
"§ 2, stk. 4 verður strikað, og í stk. 5, sum verður stk. 4, verður ", hvørji virki koma undir stk. 4 og um" strikað."
Stk. 5 verður eftir hetta stk. 4.

Viðmerkingar
Minnilutin í Fíggjarnevndini metir tað vera skeivt, at undantakið í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju fyri bátar undir 20 GT verður strikað.

Tí umframt at strika hetta undantak, skulu útróðrarbátar o.o. sambært upprunauppskotinum gjalda tað hækkandi avgjaldið, ið ásett verður.

Hetta kemur afturat øllum teim øðrum avgjaldshækkingum, ið raka borgarar og vinnurekandi, og má tað metast sum enn ein steinur oman á byrðu hjá hesum vinnugeiranum, ið frammanundan ikki er tann fíggjarliga sterkasti.

Tí mæla uppskotssetararnir til, at undantakið verður verandi í lógini.

Á Løgtingi, 15. desember 2023

Magnus Rasmussen Erhard Joensen Beinir Johannesen

Árni Skaale Steffan Klein Poulsen